# Tú krympar tærnar

**»I stället för Abrakadabra« er søgan um ein drong, ið veruliga ynskir at gera gykling til sítt lívsstarv. Hansara stóru forðingar eru, hansara manglandi gávur og tað, at pápin heldur tað vera nakað verri møsn. Filmur er ótrúliga stuttligur, væl spældur og gjørdur**



**»I STÄLLET FOR ABRAKADABRA«**

★★★★★★

Lívið hjá Thomas melur kring hansara dreym um at gerast gyklari. Hann roynir kynstur síni, hvar hann so kemur, men tíverri dugir hann illa og ístaðin fyri at skapa áhuga, kemst bara irritatión burturúr. Hóast hann roynir og roynir at vinna pápan yvir á sína síðu, eydnast tað ikki. Ynskið hansara er bara, at sonurin gerst vaksin og finnur sær eitt veruligt arbeiði.

Ótrúliga vakrar myndir við sterkum litum rúnabinda hyggjaran. Kynstrini eru skemtilig, og tú lærir beinavegin persónarnar at kenna. Alla tíðina situr tú við tí kitlandi kenslu, ikki at vita hvat verður tað næsta. Hvørja ferð hann letur munnin upp ella bara ger tí minstu rørslu, krympar tú tærnar.

Drama, spenningur, skemt og forvitni verða blandað í eina framúrskarandi heild. Filmurin er frískur og sterkur. Tá filmurin leið móti endanum, rann bert hesin eini tankin mær til hugs – Nei, ikki enda longu!

# Blóðugur óndskapur fyri ung

**Ein av varðunum innan svenska filmslist er »Ondskan« frá 2003. Erik Ponti er harði, mishandlaði drongurin, ið má berjast fyri sínum rættindum. Framleiddur professionelt og væl samanskrúvaður. Brennur seg fastan í nethindina**

**»ONDSKAN«**

★★★★★☆

Heima verður hann bukaður av fosturpápanum og í skúlanum bukar hann sjálvur onnur. Mamman verður noydd at senda hann á kostskúla, har lívið hjá honum av álvara gerðst trupult. Á skúlanum »Stjärnsberg« líðir hann undir stýrinum av eldru næmingum, ið halda eina harða hond yvir nýggju næmingunum.

Filmurin fylgir Eriki, ið er dugnaligur í skúlanum, kroppsliga væl fyri, sálarliga vanur við at berjast. Hann er tískil als ikki sum hini á skúlanum, hann torir at verja seg og svara aftur. Søgan er um eina hetju, um kærleika, um rættindi og vón.

Sera sterkar myndir vera brúktar, nógv blóð og ljóð, ið fáa teg at snerkja, tá Erik antin verður sligin ella sjálvur slær. Nógv er gjørt burturúr, og tað skilst beinavegin, at her er ikki talan um nakra bíliga filmsframleiðslu.

Sjónleikararnir eru góðir og persónarnir væl lýstir, hóast fáir fáa langa tíð á skíggjanum. Avnoktandi mamman, tyranski fosturpápin, snikuti formaðurin Silverhielm og trúgvi vinmaðurin Pierre spæla allir týdningarmiklar sterkar leiklutir í hesi søgu.



Áskoðararnir verða drignir inn í søguna og í truplu verðina hjá Eriki, har einans hin sterkasti yvirlivir. Hóast eg sjálvur hati tað, tá onkur sigur hetta, so fari eg kortini at gera tað: - Bókin var betur.